gult8 cyan8 magenta8 svart8



## DAGSINS MEINING

# Dialogur ynsktur

Um fjúrtan dagar ella so byrjar nýtt tíðarskeið í føroyskari søgu. Tá fara tvey av heimsins størstu oljufeløgum undir at bora eftir olju og gassi á føroyska landgrunninum. Hesi eru BP og Statoil. Og seinni í heyst fer so triðja oljufelagið Amerada Hess, undir sína fyrstu boring.

Stórar eru vónirnar til hesar boringar, nú umboð fyri feløgini hava verið rættiliga bjartskygd um at finna nakað. Tað skal vera løgið, um ikki okkurt av feløgunum rakar við olju, nú hetta eru øki, sum eru kannað í allar endar og kantar, áðrenn borurin verður settur í.

Føroyska samfelagið bíðar eisini í stórum spenningi eftir úrslitinum av boringunum, sum kann fyriliggja einaferð í august ella september. Spurningurin er so, um vit hava gjørt okkum ov stórar vónir um nakað, sum vit enn einki vita um við vissu. Tað vil tíðin vísa, men hetta er so »endin« ella fyri tað »byrjanin« á einum útviklingi, sum nú hevur verið fyrireikaður í mong ár.

Tað, sum er óheppið við at leitingin fer í gongd júst nú, men sum vit einki kunnu gera við, er, at tað er so nógv annað virksemi í samfelagnum í løtuni, at ein oljuleiting og virksemi í kjalarvørrinum á henni, kann vera við til at »yviruppHita« virksemi sum heild í landinum og tað, sum harvið fylgjur av hækkandi prísum, tørvi á íbúðum, barnagarðsplássum, hotellplássum osfr. Men neyvan visti nakar, tá fyrireikingarnar fóru í gongd at fara undir at leita eftir olju, at so nógv virksemi fór at vera í samfelagnum, tá so sett varð á at bora.

Hetta er so ein sannroynd og spurningurin er, hvussu vit tacla støðuna, um tað skuldi hent, at t.d. øll oljufeløgini raka við olju ella kanska um bara eitt finnur olju. Vit hava jú sett kravið um føroyska luttøku og stendur eisini í lógini, at møgulig olja skal uppá land í Føroyum. Tað merkir so aftur meira virksemi og krøv til bústaðir o.l. Hetta verður tí ein tann altavgerandi spurningurin at taka upp, tá og um olja verður funnin. Í hvønn mun ynskja vit, at alt virksemi frá oljuni skal vera her á landi, eisini oljuterminalur.

Síðani vit reistu spurningin um týdning av oljuráðlegging á hesum stað hevur býráðslimur í Havn skotið upp, at býráðið setur oljuráðleggingarnevd. Hetta er helst skilagott, men tað er týdningarmikið, at kommunalir og landsmyndugleikar finna eitt felags stev í hesum, soleiðis at vit ikki koma at gera dupult arbeiði ella draga hvør sína línu. Latið okkum fáa dialogin um hesi viðurskifti út í miðlarnar. Tað skal vera vón okkara, at lesararnir brúka blaðið til henda so týðandi dialogin og vilja vit við hesum bjóða til alment orðaskifti um nettupp hetta: verður nógv olja funnin, hvussu handfara vit hana og oljuinntøkurnar frægast?

**Sosialurin**

## VIÐMERKING

# Ber tað til?

**Signar P. Heinesen**



Lærarskúlin er í brennideplinum. Ein sigur kaos – annar sigur, at hetta er leiðin framá.

Í kjarnuni í málinum lúrir jagstranin eftir einum syndabukki, tá ið ein uppgáva gerst trupul at loysa.

Ein nevnd verður sett at kanna málið, og kanska kemur hon fram til, at onkur í skipanini hevur flýggjað undan ábyrgd. Kanska ikki. Tað veldst helst um eyguni, sum síggja. Er fokus sett á initiativskyldu og skylduna til at hjálpa tí, sum er fangaður í eini truplari uppgávu; - ella er fokus sett á, hvat ein gjørdi skeivt í eini annars ómøguligari støðu?

Gevur landsstýrismaðurin rúmd fyri ábyrgdarflýggjan, so má hann rokna við, at hansara næstu medarbeiðarar flýggja undan ábyrgd – ella við eini »slang«-orðing: »geva apuna víðari!«. Tann, sum hevur truplast við at geva apuna víðari, uttan samstundis at ganga sínum faki ov nær, er tann ella tey, sum átaka sær ta fakligu leiðsluna.

Í hesum føri eru ábendingar í tí, sum er komið alment fram, at rektarin á lærarskúlanum og onkur í Mentamálastýrinum hava átikið sær hendan trupla leiklutin. Tí lystir meg at sjá niðurstøðuna hjá kanningarnevndini – og kanska ikki minni, úrskurðin, sum politiska skipanin kemur til. Hesin úrskurður kemur at seta spor í sandin, hvussu okkara almenni sektorur verður stýrdur.

Tað fløvar at lesa í Sosialinum mikudagin 27. juni 2001, har fýra lærarar geva sínum skúla gott skoðsmál. Tað ber boð um etiskan hugburður og dirvi, tá ið fólk í smáu Føroyum velja at verja borg um tann, sum alment verður gjørdur til syndabukk, t.e. alment verður gjørdur til »problemið«.

Harvið verður ikki sagt, at tað ikki eisini krevur dirvi, tá ið næmingur kritiserar sín egna rektara. Vónandi verður hetta dirvi ikki darvað av vantandi fjølbroytni í hugburði og innliti. 'Rúmlig' fólk, sum eisini megna at seta mørk, kunnu vera við til at fáa ein mennandi dialog at virka. Ein dialog, sum rektarin eftir øllum at døma við greinum sínum í Sosialinum týsdagin 26. juni 2001 roynir at birta undir.

Soleiðis sum eg lesi greinina hjá teimum fýra lærarunum, so setir hon glæmuna á demokratiska førningin, sum eisini okkara ættarlið skal bera framá vegin. Hetta fløvar ikki minni, tí tað ber boð um, at onkur sáar til gott verk – og at tað grør onkustaðni.

Oftari og oftari hoyri eg fólk í ovastu leiðslum okkara vísa á tað ómøguliga í tí demokratiska prosjektinum: »Ein fær ikki fólk við«, »Vit kunnu tað sama brúka harða leiðslu, tað verður rok álíkavæl«, »Hitt gongur ongan veg«, »onkur má taka avgerðir, skera ígjøgnum...«

Rætt er, at tað skal bæði vilji, tol og gott hegni til at vera við á tí liði, sum ikki vil trýsta fólk, men vil taka ábyrgd í eini felags leiðsluprosess – í einum demokrati.

Rætt er, at fyri tann, sum einaferð er illa royndur av tí demokratiska arbeiðsháttinum, helst hevur ilt við at herja á aftur við somu eyðmýkt og sama dirvi.

Rætt er, at tað er so nógv lættari at síggja ítøkilig úrslit, har málini eru ítøkilig og lætt skiljandi. Har dygdin kann mátast í møttum tímum og próvkarakterum.

Men merkir hetta, at málini eru viðkomandi?

Merkir hetta, at tað ikki ber til at arbeiða demokratiskt?

Merkir hetta, at eg skal flýggja undan teirri ábyrgd, sum liggur á mær, tí eg eri føddur inn í tann demokratiska – og ríka - partin av heiminum?

Viðhvørt – ikki altíð. Nei. Nei!

Tað demokratiska prosjektið er eitt prosjekt, sum er vert at virka fyri. Prosjektið er hálvt triðja ártúsund gamalt, men enn er langt á mál. Eisini á okkara klettum.

Kjarnin í tí demokratiska prosjektinum er hjá tí einstaka at átaka sær ábyrgd fyri felagsskapinum eftir sum førleikin er og í tí nærumhvørvi, sum ein virkar undir.

Kjarnin í tí demokratiska prosjektinum er hjá tí einstaka at virka alment til frama fyri gott verk. At velja parlamentarisku umboð okkara er ein partur – men ábyrgd hins einstaka er ikki røkt við tí aleina.

Lærarskúlin er ein av fleiri berandi súlum í tí demokratiska bygninginum. Ein útbúgvin lærari hevur størri ávirkan enn flest onnur á tað komandi ættarliðið og møguleikarnar hjá hesum ættarliði at bera tann demokratiska førningin framá vegin.

Tað skal tí vera mín vón, at øll tey, sum varða av lærarskúlanum – høgur sum lágur – vilja sláa manngarð um tað demokratiska prosjektið og um lærarútbúgvingina sum so – og annars at loysa teir fíggjarligu og teknisku spurningarnar, sum liggja fyri hondina í sama máli.

Tann, sum tekur sín part av »apuni«, átekur sær ábyrgd og er við í felagsskapinum – er soldátur í demokratiska herinum.

Jú, royndirnar vísa, at tað ber til!

# Viborg Kamarkór á konsertferð

Í hesum døgum vitjar Viborg Kamarkór í Føroyum og heldur nakrar konsertir. Sunnudagin sang Kamarkórið undir gudstænastuni í Vesturkirkjuni, og í kvøld kl. 19.30 verður konsert í Fuglafjarðar kirkju.

Á sangskránni eru kend verk sum t.d. Pater Noster, Ave Maria og Panis Angelicus. Eisini er tenor-solistur og urguspæl. Kórleiðari er Jens Chr. Hansen.

Mikudagin kl. 16.00 verður konsert í Listaskálanum. Hósdagin verður vitjað á Røktar- og Ellisheiminum í Runavík, har konsert verður kl. 14.00. Hóskvøldið kl. 19.30 verður

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Marjun Dalsgaard marjun@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
John Johannessen john@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo

Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað
mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

gult9 cyan9 magenta9 svart9



Kommunuvalið á Eiði heystið 2000:

# Veljarin ið hvarv

**Í fýra greinum fer Jóannes N. Dalsgaard at viðgera málið um kommunuvalið á Eiði í november í fjør. Tá talt varð upp valkvøldið høvdu 425 fólk verið á vali. Men tá fíntalt varð, vóru 426 atkvøður. Í greinunum verður spurningurin reistur, um málsviðgerðin hesum máli viðvíkjandi var røtt og um, hvørt tað eigur at fáa avleiðingar, at eitt slíkt mál ikki verður lýst til fulnar**



*Báðu ferðirnar, tá talt varð á Eiði valkvøldið 21. november í fjør, vóru 425 atkvøður taldar. Men tá fíntalt varð viku seinni, vórðu taldar 426 atkøvður. Vallistin vísti eisini, at 425 fólk høvdu verið á valið. Hvat er hent!? Eru vallistarnir ikki førdir rætt? Ella hevur onkur framt valsvik? Hevur valnevndin talt skeivt tvær ferðir upp í slag? Ella er ein atkvøða komin í atkvøðukassan aftaná, at hann er settur á kommunuskrivstovuna? Hesir spurningar eru ikki svaraðir…*



KOMMUNUVAL
*Jóanes N. Dalsgaard*

### Valkvøldið

Tað var týskvøldið 21. novembur 2000. Klokkan var beint farin av átta tá dyrnar til valhølið vóru læstar. Løtu seinni var latið upp aftur, so Eiðisfólk kundu sleppa innar at fylgja við í uppteljingini av atkvøðunum. Tað var skjótt at telja tær gott og væl 400 atkvøðurnar. Tvær ferðir varð talt, og úrslitið varð ført í valbókina. Alt var sum tað skuldi vera.

Sambært teimum báðum vallistunum høvdu 425 fólk verið á vali. Hetta var neyvt sama talið, sum uppteljararnir vóru komnir til. Alt var, sum tað átti. Klokkan var væl fyri midnátt, tá tveir valnevndarlimir bóru atkvøðukassan við teimum 425 atkvøðuseðlunum inn á kommunuskrivstovuna. Har skuldi tilfarið goymast í 8 dagar, t.e. inntil freistin, at kæra um valið, var úti.

### Fínteljingin

Fýra dagar seinni hevur bygdarráðið á Eiði fund. Uppskot er frammi um at hava fínteljing, sum merkir, at valið skal gerast upp av nýggjum. Bygdarráðslimirnir eru ymiskir á máli um, hvørt hetta er neyðugt ella skilagott. Men tað liggur illa fyri at vera ímóti fínteljing, og eitt samt bygdarráð avgerð, at ein slík skal vera.

Fólk verða nú biðin til hetta arbeiðið og hin 28. novembur 2000, fer fínteljing fram. Talt verður fýra ferðir, og fínteljingin hevur nakrar smávegis broytingar í atkvøðubýtinum við sær. Tó hendir eingin broyting viðvíkjandi spurninginum um hvør er valdur í nýggja bygdarráðið á Eiði.

### Ósamsvarið

Men ein broyting var. Í øllum fýra teljingum varð komið fram til, at samlaða talið av atkvøðum var 426 og ikki 425, sum komið varð fram til valkvøldið. Hetta er ein atkvøða meira enn ført er á vallistarnar. Við øðrum orðum var ein atkvøða meira enn fólk, sum høvdu verið á vali.

Hvat er hent!? Eru vallistarnir ikki førdir rætt? Ella hevur onkur framt valsvik? Hevur valnevndin talt skeivt tvær ferðir upp í slag? Ella er ein atkvøða komin í atkvøðukassan aftaná, at hann er settur á kommunuskrivstovuna?

### Kæran

Spurningarnir vóru nógvir, og fekk hetta tveir Eiðismenn at kæra valið til bygdarráðið. Kært verður um uppteljingina sum so, og um at ein atkvøða er meira enn vallistarnir vísa. Bygdarráðið á Eiði viðgerð kæruna á fundi 12. desembur 2000. Hvussu orðini eru fallin á hesum fundi er óvist, men týðiligt er, at bygdarráðslimirnir eru ymiskir á málið um, hvussu málið skal loysast. 4 bygdarráðslimir vilja burturvísa kæruni, meðan 3 vilja ganga henni á møti. Kæran verður burturvíst við atkvøðutalinum 4-3.

### Sakligheitin

Eingin uttan bygdarráðslimirnir sjálvir vita um hetta atkvøðubýtið er ein mynd av, hvussu áhugamálini vóru býtt ímillum limirnar. Eingin uttan bygdarráðslimirnir sjálvir vita um tað er soleiðis, at teir 4 vóru nøgdir við valúrslitið meðan teir 3 helst vildu sæð eitt annað úrslit. Einki fæst at vita um henda spurning, tí argumentini fyri og ímóti kæruni eru ikki førd í gerðabókina hjá bygdarráðnum. Har stendur einans niðurstøðan: Kæran skal burturvísast, tí ein meiriluti sigur tað.

### Kæran til landsstýrið

Avgerðin hjá Eiðis bygdarráð verður nú kærd til Landsstýrið. Í kæruni verður dentur lagdur á, at fleiri atkvøður vóru upptaldar enn vallistin vísti, at fólk høvdu verið á vali. Dagarnar beint fyri jól biðir landsstýrið um ummæli frá bygdarráðnum og valnevndini.

### Óviljin

Tollaksmessudag svarar valnevndarformaðurin landsstýrinum, at valnevndin hevur einki at leggja afturat ummælinum, sum nevndin gav bygdarráðnum í sambandi við viðgerðina av upprunaligu kæruni. Tónin í svarinum hjá valnevndarformanninum er óblíður og avvísandi, ella sagt við einum fremmandum orði 'defensivur'. At enda í svarinum leggur valnevndarformaðurin dent á, at hann heldur kærufreistina vera úti, og at kæran tískil ikki eigur at vera viðgjørd. Hetta kann illa skiljast sum annað enn ein roynd at steðga málsviðgerðini. Spurningurin er so, hvønn áhuga valnevndarformaðurin hevur í tí.

### Ásannanin

Ímillum jól og nýggjár sendir Eiðis bygdarráð landsstýrinum frágreiðingina, sum biðið er um. Í frágreiðingini ásannar bygdarráðið, at ósamsvari ímillum uppteljingina valkvøldið, og fínteljingina er í so stórt. Hóast hesa ásannan valdi bygdarráðið kortini at burturvísa kæruni, sum nú liggur hjá landsstýrinum.

### Notatið

Á bygdarráðsfundinum 12 desember 2000 var Annfinnur V. Hansen advokatur til staðar, sum eygleiðari. Hann sendir nú landsstýrinum eitt notat frá fundinum, sum avgjørdi at burturvísa kæruni. Í notatinum skrivar Annfinnur m.a., at fínteljingarnar uttan iva vísti, at ein atkvøða var meira enn vallistin vísti. Víðari skrivar Annfinnur, at atkvøðukassin varð goymdur inni á kommunuskrivstovuni, og at einki bendi á, at brotið hevði verið inn á skrivstovuna, ella at óviðkomandi hava verið har.

### Illgrunin

Hetta týðir uppá, at varðhugi er um, at hendan eina atkvøðan, sum er ov nógv, er koyrd í atkvøðukassan aftaná, at hann er goymdur á kommunuskrivstovuni. Um so skuldi verið er talan um valsvik, sum eftir revsilógini kann geva uppí 6 ára fongsul. Men hóast illgruni er um at álvarsligt lógarbrot er framt, verður einki meira gjørt við málið, vegna tess, at "eingi tekin vóru um innbrot ella sum vísti at óviðkomandi høvdu verið á skrivstovuni."

### Líkasælan

Hetta kann sammetast við, at løgreglan finnur eitt lík við einum djúpum sárið í bringuni, men avgerð ikki at gera meira við málið, tí eingin orsøk tykist vera til, at sárið er komið í bringuna.

Bygdarráðið staðfestir, at ein atkvøða helst er komin í atkvøðukassan eftir, at hesin er goymdur á kommunuskrivstovuni, men av tí at eingin veit hvussu hetta hevur borið til, verður ikki gjørt meira við málið. Hevði tað ikki verið upplagt í einum slíkum føri at biðið løgregluna kanna málið, fyri at staðfesta um eitt lógarbrot var framt ella ikki? Ella ræðist bygdarráðið at fara til løgregluna?

### Óskketnið

Beint eftir nýggjár fær løgmansskrivstovan eina frágreiðing frá teimum, sum fíntaldu atkvøðurnar á Eiði. Í frágreiðingini siga tey m.a., at atkvøðukassin og atkvøðutilfarið ikki var segla tá fínteljararnir fingu tað flýggja. Hetta merkir, at eingin trygd er fyri, at tilfarið hevur verið órørt síðani valið.

### Avgerðin

24. januar 2001 burturvísir løgmansskrivstovan kæruni frá Eiðismonnunum báðum, við hesum grundgevingum:

•*1) "...hóast atkvøður skifta pláss á sama lista við fínteljing, er hetta ikki av sær sjálvum nokk til, at spurnartekin kann verða sett við alla uppgerðina av valinum".*

•*2) "...at ein atkvøða er meir við fínteljingina í mun til tað, sum vallistin vísir [...] er [ikki] orsøk nokk til, at spurnartekin í tí ítøkiliga førinum kann verða sett við alla uppgerðina av valinum."*

Sum tað sæst, heldur løgmansskrivstovan ikki, at ávíkavist 1) ella 2) í sær sjálvum eru nokk til at spurnartekin verður sett við uppgerðina av kommunuvalinum á Eiði. Løgmansskrivstovan tekur ikki støðu til, hvørt 1) og 2) tilsamans eru nokk til at sáa iva um valúrslitið. Tískil stendur kommunuvalið á Eiði heystið 2000 við makt.